# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sverri Viderø, Tórshavn:

## 40 ára starvsdag hjá Postverkinum



Týsdagin 22. mars 2005 hevði Sverri Viderø, deildarleiðari, í Havn, 40 ára starvsdag hjá Postverki Føroya.

Sverri er 60 ára gamal, havnarmaður og B36 viðhaldsmaður. Hann arbeiddi á Majarínum í Tórsgøtu í Havn, áðrenn hann byrjaði sum postboð á posthúsinum hinumegin gøtuna í 1965, og hevur hann starvast hjá Postverkinum øll árini.

Seinastu nógvu árini hevur hann arbeitt sum deildarleiðari og havt ábyrgdina av øllum post- og fraktflutningi og av flutningstólunum hjá postverkinum. Hann er kendur sum ein fyrikomandi og álítandi ábyrgdarmaður.

Foreldrini hjá Sverra vóru: Birgitte, f. Joensen, vanliga nevnd Birta, og Niels Johannes Viderø, vóru bæði av Viðareiði. Tey fluttu til Havnar at búgva miðskeiðis í 30-unum.

Sverri er giftur við Maluni f. Øre, úr Syðrugøtu. Tey eiga tríggjar døtur: Súsanna, Birita og Jórun. Ommu- og abbabørnini er 6 í tali.

### Andlát

16. mars
Oda Lamhauge, úr Klaksvík, 74 ár.

17. mars
Jofrid Nilstrup, fødd Joensen, fyrrverandi sjúkrsystir, ættað úr Haraldssundi, 90 ár.

18. mars
Nicodemus Brimsvík, á Strondum, vanliga kallaður Demus, 87 ár.
Vilhelm Hansen, Sandavágur, 85 ár.

19. mars
Sonja Veihe, Porkeri, 57 ár.
Svanhilda Jacobsen á Oddafløtti, Vágur, 72 ár.

20. mars
Dánjal Jacobsen av Skála, 72 ár.
Trygvi Midjord í Trøðini í Hovi, 57 ár.

## Húsini uppi á Trøðni í Fuglafirði

Tórhallur Andreasen í Fuglafirði hevur sent okkum hesar myndirnar.



*Børnini hjá Annu og Albert Eldevig framman fyri barnaheimið uppi á Trøðni í Fuglafirði. Systkini á myndini eru f.v.: Hertha Andreasen, Fuglafjørður, Gunhild Isfeldt, Tórshavn, Betty Justinussen, Tórshavn, Amanda Ellingsgaard, Eiði, Kristian Eldevig, Fuglafjørður, Olivia Johannesen, Húsar, Jákup Frants Róin, Fuglafjørður, og Hilda Andreasen, Fuglafjørður. Einasta av systkjunum sum er eftir á lívi er Hertha Andreasen, sum í dag er 86 ára gomul.*



*Jolina Andreasen, f. Isfeldt, giftist við Tummas Andreasen, búsitandi í Fuglafirði*



*Anna Eldevig, f. Gaard, ættað av Hellunum, giftist við Albert Eldevig í Fuglafirði, og dóttirin Hertha, sum í dag er 86 ára gomul*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma og omma okkara

**Brynhild Niclasen**
**Hesti**

doyði og varð jarðað.

Takk fyri hjálpsemi við sjúkrarøkt, jarðarferð og ervi.

Tøkk fyri blómur og gávur til Lágargarð og takk til tykkum øll, sum fylgdu henni av Lágargarði og úti í Hesti.

*Familjunnar vegna*
**Louisa, Hans Jákup, Kári og Jórun**

*Eg milda geri sorg og gleði trygga*

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Niels Persson**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Sverra Steinhólm, prest.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.

Takk fyri vitjanir og samrøður. Takk fyri blómur, kransar og gávur. Hjartans tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

Tøkk til tykkum, ið fylgdu honum til hvíldar.

Gleðiligar páskir øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Marin Kristina**
**Petur Eli, Jón Herluf og Rúni við familjum**